

# Christmas Child – ein tøkk

**Christmas Child 2008 fekk sera góða undirtøku millum føroyingar. Inn komu íalt 3.291 skógvaeskjur, og tað er tað mesta nakrantíð í Føroyum. Fyrireikararnir takka í tíðindaskrivi øllum sum hava latið skógvaeskjur til tiltakið**

Vit takka øllum teimum, sum hava verið við til at vísa neyðstøddum børnum kærleika við at geva teimum jólagávur í ár. Inn komu íalt 3.291 skógvaeskjur, og tað er tað mesta nakrantíð í Føroyum.

Uml. 45 samkomur, kirkur og felagsskapir eru við í tiltakinum umframt nakrir skúlar. Eskjurnar úr Føroyum fara hesaferð til Kyrgyzstan, Rumenia og Serbia. Skógvaeskjurnar verða latnar børnum, sum eru fátøk, foreldraleys, sjúk ella á annan hátt hava brúk fyri eini jólagávu.

### Endamálið við at geva eskjur

Endamálið við at geva eskjur er at vísa treytaleysan kærleika. Tá eitt barn fær eina jólagávu treytaleyst verður tað mint á, at onkur hugsar um meg og elskar meg. Tað er ógvuliga gott at koyra eitt bræv í eskjuna við fotomynd, so barnið sær hvør hevur givið eskjuna. Hetta persónliga, ein til ein-forholdið, kann broyta eitt mannalív. Franklin Graham sigur, at tað mest umráðandi vit kunnu "koyra í" eskjuna er bøn, so minnist til at biðja fyri børnunum, sum fara at fáa eskjurnar. Biði eisini fyri, at eskjurnar koma fram í øllum góðum.

### Um tiltakið

Operation Christmas Child er partur av virkseminum hjá Samaritans Purse. Hvørt ár verða 7-8 mió. skógvaeskjur latnar børnum í 95 londum. Sjálvboðin fólk og felagsskapir í USA, Kanada, Australia, Stóra Bretlandi, Niðurlondum og Føroyum savna eskjurnar. Alt arbeiði í Føroyum verður gjørt ólønt.

### Tøkk

Vit takka øllum sum hava stuðlað tiltakinum á ymsan hátt. Við biðja Guds signing yvir tykkum og teimum, sum fáa gávurnar.

*Vegna Operation Christmas Child: Durita Djurholm og Beinta Áargarð*

# Gamlar myndir úr Vestmanna



Her eru fýra gamlar myndir úr Vestmanna, sum ein lesari hevur sent okkum. Hesin ynskir at vita, um onkur kennir fólk og leikarar á myndunum, og í hvørjum sambandi tær eru tiknar.

Um onkur hevur upplýsingar í hesum sambandi, er viðkomandi vælkomin at ringja til telefon: 284444 ella á teldupost adr: birgir@sosialurin.fo





*Gamla búmerki hjá VÍF*



Sosialurin
Sosialurin i